

Gøtufólk fingu mikudagin høvið at fara eftir armbondunum til G!, sum kommunan hevur keypt teimum

# Eyka fartelefonstøð í Gøtu

**Føroya Tele hevur sett upp eina eyka fartelefonstøð í Gøtu í sambandi við G!'**

G!
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í fjør fekk Føroya Tele trupulleikar við fartelefonnetinum, tá G! festivalurin var. Fyri at tryggja sær, at hetta ikki endurtekur seg, hevur telefonfelagið sett upp eina eyka telefonstøð í sambandi við festivalin.

Hon skal kunna nøkta tørvin hjá teimum mongu festivalgestunum í ár.

### Gøtufólk armbond

Gøtu Kommuna er ein av høvuðsstuðlunum til G! festivalin. Kommunan hevur keypt øllum íbúgvunum í kommuni atgongumerki til festivalin.

Mikudagin fingu borgararnir høvið at fara eftir armbondunum, og vóru ein rúgva av fólki møtt upp. Tað frættist úr Gøtu, at ein stríður streymur av fólki var allan dagin inn í G! hølini í Valhøll.

Manhattan
PUB & CAFÉ
Livandi tónleikur
Hóskvøldið:
Double up frá kl. 17.00 - 23.00
Fríggjakvøldið:
GoGo Blues
Leygarkvøldið:
Sámal & Ronnie
Upplatingartíðir:
Mánadag - hósdag 12.00-23.30
Fríggjadag - leygardag 12.00-03.30
Sunnudag 17.00-24.00
Manhattan
PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

# Ikki ráð til føroyskt

**Verða politisk stig ikki tikin, verður framleiðslan hjá SvF í 2005 minni, enn hon var í 2001**

SVF-ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*

Fýra túsund krónur. Tað var tað, sum lá eftir hjá Sjónvarpi Føroya fyri roknskaparárið 2003, tá landskassin hevði fingið tær 175 tkr., sum vóru ásettar sum yvirskot á fíggjarlógini.

Sum so ikki nakað úrslit at reypa av, men hinvegin munandi betri enn hallið, sum áður hevur eyðkent stovnin.

Júst hetta hallið var ein av orsøkunum til, at Sjónvarpið í fjør valdi at hækka hyggjaragjaldið, men í ársfrágreiðingini verður nevnt, at hendan hækkanin munaði millum lítið og einki.

»Um hugt verður einans búskaparliga og rakstrarliga eftir, hvussu hendan hækking skuldi disponerast, so átti helst ikki at verið farið undir at økja um virksemið. Samlaða inntøkuøkingin gjørdist 4 mió kr., og lønar- og prísvøkstur fóru við umleið 30% av hesum í 2003 og økist umleiðs eins nógv í 2004«

Soleiðis verður millum annað staðfest í frágreiðingini, har tað eisini verður sagt, at hóast hesa støðu, so vísti tað seg at vera ógjørligt at standa ímóti fólksligu og polit-isku krøvunum um økta framleiðslu, tá hyggjaragjaldið hækkaði.

### Døpur útlit og eingin stuðul

Tað kemur so ikki upp á tal at økja hyggjaragjaldið enn meira í 2004 og 2005, og tí staðfestir SvF longu nú, at virksemið hjá stovninum verður minkað í 2005. Somikið nógv, at talan verður um minni virksemi, enn talan var um undan seinastu hækkingini av hyggjaragjaldinum.

Umframt lønar- og prísvøkstur á útreiðslusíðuni, so er ein tungtvigandi orsøk til hetta, at talan framyvir ikki verður um almennan stuðul til tøkniíløgur, men at stovnurin ístaðin noyðist at fíggja hesar umvegis raksturin. Í fjør var játtanin frá Løgtinginum 3,5 mió kr., men hesar verður stovnurin framyvir noyddur at finna innan raksturin.

Samstundis vísir leiðslan á, at talan neyvan verður um aðrar inntøkuøkingar. Eitt nú verður sagt, at kappingin frá donsku Tipstænastuni um spælipengar er harðnað munandi.

### Neyðarróp

Og í seinasta partinum av ársfrágreiðingini sendir SvF-leiðslan eitt ordans skot mótvegis politiska myndugleikanum.

»Støðan viðvíkjandi framtíðini hjá SvF er enn líka óavklárlað, sum hon var, tá núverandi leiðsla tók við í august 2001. Eingin politisk avgerð er tikin, og einki politiskt kjak hevur verið um framtíðarstøðuna og uppgávurnar hjá einum almennum føroyskum sjónvarpið…

…Politiski myndugleikin má tí taka støðu til, um vit skulu hava eitt sjónvarp, sum skal dúva upp á teir umleið 8 tímarnar av føroyskum tilfari um vikuna, sum kunnu framleiðast við verandi fíggjarorku, ellu um vit skulu hava eitt føroyskt sjónvarp við eini munagóðari skrá, ið er sett saman av føroysk-um tilfari og útlendskum sendingum, sum eru týddar til føroyskt«

Og at enda verður sagt, at um politiski myndugleikin ikki ger sær greitt, hvat sjónvarpsframleiðsla veruliga kostar, so verður støðið á virkseminum í 2005 minni enn tað, sum tað varð í 2001.

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging

Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo



*Hóast sjónvarpsgjaldið hækkaði við triðingi í fjør, so verður talan helst um minni føroyskt tilfar á skíggjanum framyvir*

# ítróttur

Nr. 134 • fríggjadagur • 16. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB fekk bank í Georgia



*HB fekk ein ordans bank í Georgia, tá ið teir taptu 0-5 fyri FC Wit*

**Føroyameistararnir úr HB fingu oyruni í maskinuna, tá ið teir mikukvøldið leiktu Champions League undandyst ímóti georgiska linum FC Wit í georgiska høvuðsstaðnum Tbilisi**

CHAMPIONS LEAGUE
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Oddaliðið í fremstu føroysku fótbóltsdeildini, HB, kemur í dag aftur til Føroya, eftir at teir hava verið á ferð í Georgia, har teir mikukvøldið leiktu Champions League undandyst ímóti FC Wit. Ferðin var ikki serliga væleydnað, tí havnarmenninir komu aftur úr Georgia við einum 0-5 tapi.

### Gekk skjótt

Teir 5.000 áskoðararnir á Boris Paichadze leikvøllinum í Tbilisi sóu eitt georgiskt lið, sum frá fyrsta bríksli hevði munin á sínum føroysku mótstøðumonnum. Liðið hjá HB hevði ilt við at fóta sær í teimum 30 hitastigunum, og tað vóru einans leiktir 12 minuttir, tá ið Vladimer Gochashvili legði vertirnar á odda. Hetta var ikki júst tann byrjanin upp á dystinum, sum HB hevði ætlað sær, og støðan versnaði bara, so hvørt sum fyrri hálvleikur leið.

Fyrst økti Otar Martsvaladze til 2-0, og áðrenn kypritoiski dómarin, Costas Theodotou, hevði bríkslað fyri hálvleikssteðgi, var georgiska liðið komið á odda 3-0 við einum máli, sum David Dighmelashvili hevði skorað.

### Avgreiðsluspurningur

Tað sást á øllum brøgdum, at talan var um ein avgreiðsluspurning hjá FC Wit, og spurningurin var bara, hvussu stórur sigurin hjá FC Wit fór at verða. Útlitini hjá HB í seinna hálvleiki vóru ikki góð, tí longu tá ið tríggir minuttir vóru leiktir eftir steðgin, legði georgiska liðið seg á odda 4-0, tá ið Alexander Intskirveli var á blettinum og fekk bóltin framvið Danny Rasmussen í málinum hjá HB.

Georgiska liðið helt fram við at trýsta á málið hjá føroyameistarunum, og bert tíggju minuttir eftir fjórða málið hjá FC Wit, var aftur galið í verjuni hjá HB, og Irakli Ebanoidze legði georgiska liðið á odda 5-0, og enn var ein hálvur tími eftir at leika. Havnarmenninir fingu tó forðað georgiska meistaraliðnum í at skora enn fleiri mál, og tí gjørdist endaliga úrslitið 5-0 til FC Wit.

Úr Georgia frætta vit, at fleiri av málunum hjá FC Wit vóru fullkomiliga óneyðug, og at bert tvey av málunum vóru veruliga gjøgnumspæld. HB hevði ilt við at koma til nakrar málmøguleikar, og veruleikin er helst tann, at talan bert er um ein avgreiðsluspurning, tá ið georgiska liðið kemur til Føroya at taka dystin upp aftur við føroysku meistararnar á Tórsvølli komandi mikukvøld.

### FAKTA

**FC Wit - HB 5-0(3-0)**
Boris Paichadze Leikvøllurin, Tbilisi
1-0 Vladimer Gochashvili, 2-0 Otar Martsvaladze, 3-0 David Dighmelashvili, 4-0 Alexander Intskirveli, 5-0 Irakli Ebanoidze
**Dómari:** Costas Theodotou, Kypros
**Áskoðarar:** uml. 5.000
**Byrjunarliðið hjá HB:** Danny Rasmussen - Hallur Danielsen, Vagnur M. Mortensen, Símun Eliasen, Janus Joensen - Kári Nielsen, Emil Nolsøe Leifsson, Rúni Nolsøe liðsk., Jákup á Borg, Heðin á Lakjuni - Heine Fernandez
*(Vegna vánaligt samband til Georgia eydnaðist tað okkum ikki at fáa útskiftingarnar hjá HB við, blðm).*

## Fá atgongumerkir eftir til Fraklands-dystin

**Atgongumerkini til heimadystin ímóti Fraklandi eru við at ganga undan í Fótbóltssambandinum**

FORSØLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Heilt síðani lutakastið til HM-undanspælið var í vetur, hevur áhugin fyri heimadystin ímóti Fraklandi verið ovurhonds stórur. Øll vilja síggja fronsku stjørnurnar á Tórsvølli, og nú eru atgongumerkini við at ganga undan.

### Ikki nógvir franskir áskoðarar

Aðalskrivarin í Fótbóltssambandi Føroya, Ísak Mikladal, sigur, at tað eru bara heilt fá atgongumerkir eftir til dystin ímóti Fraklandi. Síðani forsølan byrjaði hevur stórur gravgangur verið eftir atgongumerkunum, og Ísak Mikladal sigur, at er tað nakar, ið ætlar sær til dyst, men sum einki atgongumerki hevur, so noyðist viðkomandi at gera skjótt av.

Hinvegin er ikki væntandi, at tað verða nógvir franskir áskoðarar til dystin. Aðalskrivarin í FSF sigur, at teir ikki enn hava fingið nakað endaligt tal frá franska fótbóltssambandinum, men hann hevur fingið at vita, at føroyingar ikki skulu vænta nógvar gestir úr Fraklandi. Tó leggur Ísak Mikladal afturat, at tað allarhelst verða latin eini 300 til 400 atgongurmerkir til Fraklands.


Trygg á leiðini
Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.
Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Tryggingin tekur hond um tað dýrabarasta vit eiga.
Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.
Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.
Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.
Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.
Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.
Teknar tú eina Vanlukkutrygging í juli, fært tú 50% í avsláttri av gjaldinum fyrsta árið
www.trygging.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari